# Hagastýri mótmælir útbjóðingarætlan hjá Landsverkfrøðinginum

**Koyringin av gróti úr grótbrotinum í Porkeri eigur ikki bjóðast út. Hagin, har grótbrotið liggur, er ognarhagi, og stemningur er í Porkeri fyri at nokta Landsverkfrøðinginum at nýta grótið, missa porkeningar arbeiðið í grótbrotinum, sigur Sigmundur Olsen, limur í hagastýrinum í Porkeri.**

GRÓTBROT
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ætlaninar hjá Landsverkfrøðinginum um at bjóða út koyringina við gróti úr grótbrotinum í Porkeri fellur ikki í góða jørð hjá hagastýrinum í Porkeri. Landsverkfrøðingurin hevur í umbúna at bjóða út koyringina úr grótbrotinum í Porkeri oman á havnaøkið í bygdini. Haðani verður grótið síðan flutt við skipi norður á Kollafjørð og koyrt niðan í verkið hjá Landsverkfrøðinginum í Hundsarabotni. Umleið 10 mans arbeiða í grótbrotinum í Porkeri, umframt teir tríggjar, sum koyra grótið oman á havnaøkið.

Landsverkfrøðingurin og lastbilaførararnir hava í fleiri ár havt eina fasta avtalu um koyringina, har landsverkfrøðingurin hevur latið 10 krónur fyri tonsið av gróti, ið koyrt er koyrt oman á havnaøkið. Áður hevur tað verið vanlig mannagongd hjá landsverkfrøðinginum at biðja fólk á staðnum gera ymsu arbeiðini fyri stovnin, og síðan hava partarnir samráðst seg til ein fastan prís. Men nógvar atfinningar hava verið um hesa skipan, og í dag hevur landsverkfrøðingurin tann yvirordnaða politikk, at øll arbeiði skulu bjóðast út. Bæði fyri at allir skulu hava møguleika at bjóða, og eisini fyri at kanna, um til ber at spara pengar.

Sjóvegis flutningurin við gróti úr Porkeri norður á Kollafjørð hevur í fleiri ár verið bjóðaður út, í summar varð koyringin við Porkerisgrótinum av havnaøkinum í Kollafirði niðan í Hundsarabotn boðin út, og tí er nú bara koyringin í Porkeri eftir at bjóða út. Men porkerningar eru alt annað enn fegnir um ætlaðu útbjóðingina av koyringini úr grótbrotinum. Teir vísa á, at støðan er ein onnur hjá teimum enn t.d. hjá teimum, sum koyra á meginøkinum, tí lastbilaførarnir í Porkeri fáa einki annað arbeiði, missa teir koyringina fyri landsverkfrøðingin. Eisini vísa teir á, at koma aðrir, sum hava størri lastbilar, og bjóða uppá koyringina, so megna porkeningar ikki at standa seg í kappingini.

## Hagastýrið mótmælir

Økið, har grótbrotið liggur, er partur av ognarhaga, og ætlanirnar hjá landsverkfrøðinginum um at bjóða koyringina út hevur vakt ans í hagastýrinum. Sigmundur Olsen, sum er limur í hagastýrinum, sigur, at limirnir í hagastýrinum hava umrøtt málið, síðan tað frættist um útbjóðingina

- Tað er breið semja í hagastýrinum um at mótmæla ætlanunum hjá landsverkfrøðinginum um at bjóða arbeiðið út, sigur Sigmund Olsen. Hagin, har gróðtbrotið liggur, er tilsamans 12 merkur og er býttur millum umleið 50 eigarar, teir flestu úr Porkeri. Sigmund Olsen sigur, at tað finst bara ein munnlig avtala millum hagan og landsverkfrøðingin, um at landsverkfrøðingurin sleppur at taka grótið. Fyri hetta fær hagin eitt ávíst gjald fyri tonsið.

Enn hevur hagastýrið ikki tikið støðu til møgulig tiltøk móti landsverkfrøðinginum. Sigmund Olsen sigur tó, at tað er stemningur í hagastýrinum fyri at nokta landsverkfrøðinginum grótið, vísir tað seg, at porkerningar missa koyringina. Av tí at hagastýrið ikki hevur viðgjørt málið endaliga enn, dugir hann ikki at siga, hvørt hagin fer at seta tiltøk í verk, so skjótt arbeiðið verður boðið út, ella teir fara at bíða og síggja, um porkerningar sleppa at halda fram við arbeiðinum.

Landsverkfrøðingurin segði herfyri við Sosialin, at kanningar fyrst skulu gerast í samband við eina komandi útbjóðing, og tí væntaði hann ikki, at arbeiðið verður boðið út í ár.

Sigmund Olsen sigur, at hendir einki óvæntað áðrenn, so verður málið tikið upp á árliga hagafundinum, sum verður í fyrst í januar mánað næsta ár. Tá skal eisini støða takast til, um hagin skal nokta landsverkfrøðinginum grótið, vísir tað seg, at porkeningar missa koyringina.

- Tað er ein stór avgerð at taka og krevur eisini nógva viðgerð. Tí nokta vit at lata teimum grótið, so merkir tað eisini, at grótbrotið stongir, og tá missa enn fleiri porkeningar arbeiðið, sigur Sigmund Olsen.









# Røktin av gomlum og veikum skal verða í nærumhvørvinum

**Síðsta fríggjadag hevði landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, fund við kommunufeløgini um eldraøkið. Fundurin, sum var á Sandi, var byrjanin til fleiri fundir millum land og kommunur um eldraøkið, sum skal leggjast út til kommunurnar at umsita og gjalda**



*- Úti í kommununum umsitir tú teg sjálvan, og tað má vera tað besta, sigur Jógvan Krosslág, formaður í Kommusamskipan Føroya, sum saman við øðrum var á fundi við landsstýrismanninum, Páll á Reynatúgvu, síðsta fríggjadag*

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Síðsta fríggjadag var fundur á Sandi um eldraøkið.

Tað var landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, sum hevði kallað kommunufeløgini, Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya, til fundar.

Hetta er fyrsti fundurin millum land og kommunu í hesum umfari um eldraøkið, sum semja er um skal leggjast út til kommunurnar at umsita og gjalda.

Hetta er eitt stórt øki, og helst verða fleiri fundir um, hvussu økið skal skipast – nær og hvussu nógv skal leggjast út í senn.

Kommunurnar fara sjálvsagt ikki bara at taka sær av økinum, men peningurin, sum tað almenna í dag rindar til økið, má á ein ella annan hátt fylgja við.

Um hetta í fyrstu syfti verður ein blokkur – ella ein regulering yvir skattin, er ikki greitt enn. Málið er tó, at skatturin hjá borgarunum ikki verður øktur – ikki uttan so, at tær kommunur, sum vilja veita eina betri tænastu á økinum, vilja gjalda meira fyri hesa tænastu.

Tað er nú einaferð soleiðis, at har tænastan í eini kommunu er góð, kostar hon meira pening enn í eini kommunu, har tænastan er verri.

Og soleiðis vil tað nú einaferð vera.

Landsstýrismaðurin ynskir tó, at økini í nýggju skipanini verða nøkulunda eins fyri.

## Eingin skrá

Jógvan Krosslág, sum er formaður í KFS, Kommunusamskipan Føroya og formaðurin í Føroya Kommunufelag, Jákup Vestergaard, vóru báðir við á fundinum saman við sínum fólki.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Jákupi, men Jógvan hittu vit í telefonini í gjáramorgunin.

Hann sigur, at hetta var ein kunnandi fundur, sum landsstýrismaðurin kallaði saman til. Eingin beinleiðis skrá var løgd fyri fundin, men tosað varð aftur og fram um hetta stóra økið, sum eldraøkið er í samfelagnum.

– Málið við fundinum var at fáa nøkur sjónarmið fram um økið, bæði frá kommununum og landsstýrismanninum.

Jógvan heldur tó ikki, at nakað serligt kom burtur úr hesum fyrsta fundinum – ikki nakað ítøkiligt sum so. Men hetta var kortini ein góð byrjan.

– Semja er um, at eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar at umsita og gjalda, men enn er langur vegur á mál, áðrenn øll viðurskifti eru komin uppá pláss.

Hann sigur, at ein av teimum stóru spurningunum verður, hvussu býtið millum land og kommunur skal vera, og hvussu hetta skal skipast – ikki minst í byrjanini, tá ið partar av økinum verða lagdir út til kommunurnar.

– Í dag er skipanin við eldrasambýlum hon, at landið rindar 50.000 kr. fyri hvørji 10 búpláss til byggingina, tó ongantíð meira enn hálva miljón. Tað merkir, at er talan um 12 búpláss, rindar landið 50.000 kr. fyri tey fyrstu 10. Hin partin bera kommunurnar sjálvar. Síðan rindar landið arbeiðslønirnar, undantikið løn til náttarvaktirnar, sum kommunurnar taka sær av.

Jógvan sigur, at við bygging av ellis- og røktarheimum er býtið nú helvt um helvt.

## Alt ella partvís

– Landsstýrismaðurin segði á fundinum á Sandi, at ætlanin er at leggja økið út til 1. juli komandi ár, men enn er ikki greitt, í hvussu stóran mun hetta kann gerast til ta tíð. Hetta er eisini ein spurningur, ið greiða má fáast á. Verður talan um alt økið í einum, sum ikki er serliga hugsandi, nú komið er so stutt ávegis – ella verður talan um tann léttara partin í fyrsta umfari, sigur Jógvan Krosslág.

Sum skilst, er eingin ósemja um, at eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar, men spurningurin er á hvønn hátt, hetta skal gerast.

– Hetta er eitt ynski, bæði frá kommununalari síðu og landsins síðu. Málið er at hava ein greiðari skilnað millum land og kommunu, og semja er um, at hetta er rætta loysnin.

Jógvan vísir á, at tá ið kommunurnar tóku sær av barnaøkinum, sum hann tekur til, gjørdist tænastan betur – og eisini dýrari, sum náttúrligt er, tá ið nógv meira verður gjørt á økinum.

– Við at leggja hesi økir út til kommunurnar at umsita og gjalda, kemur tú nærri borgarunum og kann tískil veita eina betri tænastu. Samstundis er vandin fyri, at alt endar í miðstaðarøkinum, minni. Úrslitið verður, at fólk framvegis verða búgvandi um landið. Úti í kommununum »umsitir« tú teg sjálvan, og tað má vera tað besta. At ríva pelarnar undan fólki, er eingin loysn, tá ið tey kunnu verða verandi í sínum egna umhvørvi.

Jógvan vísir á, at fólk náttúrliga vilja búgva í nærumhvørvinum – eisini, tá ið tey gerast gomul og veik, tí har hava tey sína familju, vinir og kenningar.

## Byggjast upp

Formaðurin í Kommunusamskipan Føroya sigur, at neyðugt verður at byggja eldraøkið upp úti í kommununum so við og við.

– Við sama støði sum higartil, verður kostnaðurin hin sami. Tað er bara ein spurningur um býtið av skattakrónunum millum land og kommunu. Hetta er ein partur av tí, sum land og kommunur noyðast at samráða seg fram til, sigur Jógvan Krosslág at enda.

# Sjómenn aftur á vøllin í Kaksvík

**Neyðugt er at boða frá luttøku í seinasta lagi, 15. desember**

HUGNI
*Vilmund Jacobsen*

Aftur í ár fara fiskimenn og sjófólk annars at spæla innandurafótbólt í Klaksvík.

Kappingin verður í Ítróttarhøllini í Klaksvík, og hon verður leygardagin, 28. desember.

Tá ið liðugt er, og menn eru úttuskaðir, verður borðhald í Skúlaheiminum, har sjófólk kunnu halda sær at gamni afturvið einum góðum bita.

Heiðurslønir verða lætnar vinnandi liðunum.

Teir, sum skipa fyri kappingini, siga, at neyðugt er at boða frá luttøku í seinasta lagi, 15. desember, og hetta verður gjørt við at ringja á telefon 217739 ella við at senda eitt telefaks á telefon 457611. Eisini ber til at senda ein teldupost til adressuna palli@chr-i-grotinum.fo

Kostnaðurin fyri luttøkuna, er 1000 kr. fyri hvørt liðið og tilber at hava 8 leikarar á hvørjum liði.

Tað er stuttligt, at manningar soleiðis taka seg saman og skipa fyri hugna millum høgtíðirnar, tá ið nógvar skipsmanningar eru heima.

Spurningurin er so, um hetta ávirkar landsfundin hjá Føroya Fiskimannafelg, ið plagar at vera um nøkulunda somu tíð.

Vit ynskja manningunum eina góða og undirhaldandi fótbóltskapping.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg